MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Tíðaravmarkað starv sum fyrstilærari í Skála skúla

Vegna farloyvi verður starvið sum fyrstilærari í Skála skúla lýst leyst til setanar í tíðarskeiðinum frá 1. august 2018 til 31. juli 2019. Í skúlanum eru 75 næmingar í 7 árgangum, og 7 lærarar í føstum starvi starvast í skúlanum.

**Um starvið**

Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Hann skal virka fyri, at næmingar og lærarar trívast, skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim og í samstarvi við foreldrini virka fyri, at næmingarnir fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing.

Harumframt skal fyrstilærarin vera førur fyri at skipa eina mennandi starvsfólkaleiðslu, skapa umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning. Eisini skal fyrstilærarin skapa virðing fyri skúlanum og leggja dent á at menna skúlaskapin í kommununi.

**Førleikakrøv**

Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Setanarviðurskifti**

Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Skála skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkunum 33.1 og 34.1 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Mentamálaráðnum í hendi **í seinasta lagi 17. apríl 2018.**

**Umsóknin verður stílað til:**

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*